# Viðgerðartrygging

## Tínir møguleikar
### – Mín síða Privat

Tú finnur sjálvgreiðsluna *"Min side"* á heimasíðuni gjensidige.dk. Har kanst tú til dømis:

- Fylla fráboðan út
- Senda læknaávísing
- Hyggja at tínum dekningum
- Samskifta um at fáa útreiðslurnar endurrindaðar
- Síggja tíni samtykki

**Fyll fráboðan út**
Fært tú eina sjúku ella ein skaða, sum krevur kanning ella viðgerð, skalt tú fylla eina fráboðan út. Gev gætur, at nakrar av viðgerðunum krevja ávísing frá lækna. Í tryggingartreytunum kanst tú lesa meira um, nær tað er neyðugt við læknaávísing.

Tryggingartreytirnar finnur tú á síðuni, www.gjensidige.dk undir *"Mine dækninger"*. Tá ið tú hevur fingið ávísingina frá kommunulæknanum, fert tú inn á heimasíðuna og sendir hana saman við fráboðanini.

Tú fært svar innan 1-2 yrkadagar.

1. Um tað er neyðugt, far so fyrst til egnan lækna og fá eina ávísing uppá skaðan, sjúkuna ella pínuna.
2. Far inn á www.gjensidige.dk undir *"Min side"* og fyll eina skaðafráboðan út, ella ring til Gjensidige á +45 70109009
3. Tú frættir aftur innan 1-2 yrkadagar, og svarið finnur tú á *"Min side"*.

**Kanna tínar dekningar**
Tað eru altíð galdandi tryggingartreytir, sum gera av, um sjúkan/skaðin eru fevnd av tíni viðgerðartrygging. Galdandi tryggingartreytir finnur tú á www.gjensidige.dk undir *"Mine dækninger"*. Har fært tú yvirlit yvir, hvat tryggingin fevnir um, og tú kanst eisini taka treytirnar niður.

**Fá útreiðslurnar endurrindaðar**
Skalt tú hava útreiðslur endurgoldnar í samband við viðgerð, fert tú undir *"Refusion af udlæg"*. Tað ganga umleið 14 dagar frá tí, at tú søkir um at fáa pengarnar endurgoldnar, til tú fært teir. Pengarnir verða fluttir á ta konto, sum tú hevur upplýst.

**Kanna tíni samtykki**
Undir "Mine samtykker" finnur tú eitt yvirlit yvir, hvørji samtykki tú hevur givið. Hetta fevnir bæði um vanlig samtykki og samtykki, sum eru givin í samband við ein skaða, tú hevur boðað frá. Tú stýrir skjótt og einfalt tínum samtykkjum við at klikkja á einstaka samtykkið.